## Holst og teir strúk avstað

Oddaliðið í næstbestu donsku fótbóltsdeildini vann í gjár stórsigur. Lyngby spældi á útivølli ímóti HIK, og Lyngby vann 4-1. HIK fekk ein spælara vístan av vølli eftir 33 minuttir, og 10 minuttir inn í seinna hálvleik fingu teir eitt reytt kort afturat. Tá var støðan longu blivin 4-1, og fleiri mál komu ikki í dystinum. Christian Lamhauge Holst spældi allan dystin fyri Lyngby, men hann skoraði ikki hesaferð. Tað gjørdi hinvegin Anders Jochumsen, sum gjørdi fyrstu trý málini hjá Lyngby.



## Randers ímóti banamonnum hjá B36

Lutakastið í UEFA Cup kappingini í farnu viku hevði við sær, at danska superligafelagið Randers FC skal spæla ímóti turkiska felagnum Fenerbahce. Tað var júst turkiska liðið, sum sendi B36 út úr Champions League við tveimum trivaligum sigrum. Randers hevur gjørt av, at heimadysturin ímóti Fenerbahce skal spælast í Århus, tí áhugin fyri dystinum er størri, enn leikvøllurin í Randers kann klára at hýsa.

## Skaptu ov lítið

Verjuspælarin Kaj Ennigarð skoraði bæði málini hjá GÍ í Fuglafirði sunnudagin, og tað segði nakað um støðuna á liðnum, sum hevði nógv spæl, men hevði trupulleikar við at skapa kjansir.

– Vit hava nógv spæl allatíðina, men vit skapa ov fáar kjansir. Tað var ikki, fyrr enn vit vóru komnir aftur um og satsaðu, at vit fingu mál. Soleiðis var tað eisini ímóti B68 seinast, sigur Kaj Ennigarð.

– Vit fóru eftir øllum stigunum í Fuglafirði, men vit fingu bara eitt stig, og tað kunnu vit ikki brúka til so nógv, helt hann.

## Argir um javnleikin

Teir á heimaliðnum vóru vónbrotnir um, at teir ikki fingu øll trý stigini til høldar, hóast teir vóru á odda beint fyri leiklok.

– Eg var rættiliga argur eftir dystin, tí vit tveita aftur hetta vikuskiftið ein sigur burtur. Vit áttu at hildið fast seinastu løtuna, sigur Símun Eliasen, spælandi venjari hjá ÍF.

– GÍ hevði bóltin nógv, men teir komu ikki til veruligar kjansir. Teir høvdu onkur horna og innlegg, men vit forðaðu teimum í at fáa opnar kjansir. Hinvegin høvdu vit onkrar kjansir, og tí var tað als ikki óuppiborið, at vit fingu stig burtur úr dystinum. Eg hevði tó vilja havt øll trý stigini, sigur hann.



*Nenad Saric og hinir á ÍF-liðnum vóru vónbrotnir um, at tað ikki eydnaðist at vinna dystin móti GÍ*

*Mynd: Jonhard Hammer*

ÍF-GÍ 2-2 (1-0):

# ÍF spældi við 12 monnum

ÍF

GÍ

**ÍF spældi eina lítla løtu við 12 monnum ímóti GÍ í Formuladystinum í gjár. Ein misskjiling í dómarabólkinum og millum spælara og dómara endaði við, at ÍF fekk 12 spælarar á vøllin**

ÍF-GÍ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

12. maður hjá ÍF sunnudagin var hvørki áskoðari ella dómari. Hinvegin hendi tað í kampens hede móti endanum av dystinum, at fuglfirðingar høvdu 12 spælarar á vøllinum samstundis. Tað var beint undan málinum, sum ÍF skoraði til 2-1 seint í dystinum.

ÍF-spælarin Christian Soelberg fekk ein snudd í beini og var tikin út um vøllin til viðgerð. ÍF-bonkurin gjørdi skjótt av og setti nýggjan spælara inn fyri hann. Tá ið skaddi spælarin so kom fyri seg aftur, fór hann aftur á vøllin, og harvið gjørdist hann 12. spælarin hjá ÍF á vøllinum.

– Hatta var ein misskiljing millum meg og hjálpardómaran. Eg fekk ikki við, at tað var Christian Soelberg, sum varð skiftur út, og spælarin visti heldur ikki sjálvur, at hann varð skiftur út. Tá ið hann so bað um at sleppa inn á vøllin aftur, vinkaði eg hann inn, sigur Dagfinn Olsen, sum var dómari í dystinum.

Christian Soelberg var bert lítla løtu á vøllinum, til hann varð gjørdur varugur við, at hann varð skiftur út.

– Eg valdi ikki at geva honum gult kort fyri at koma á vøllin aftur sum 12. spælari, tí eg taki hatta á mín kappa. Eg rokni ikki við, at tað hendir meira í hasum malinum, sigur dómarin.

### GÍ meira spæl

Dysturin millum grannarnar lagaði seg soleiðis, at GÍ hevði bóltin meira enn heimaliðið, men heimaliðið vardi væl, og GÍ fekk ongar veruligar málkjansir burtur úr leikligu yvirvágini.

Miðskeiðis í fyrra hálvleiki legði ÍF seg á odda við máli, sum Nenad Farich gjørdi. Hann spældi hangandi álopsspælari, og tá ið hann fekk eina sending mitt fyri, tamdi hann millum tveir verjuspælarar og smekkaði í málið.

Eftir hetta kundi ÍF veruliga dúva upp á taktikkin við vælskipaðari verju og kontraspæli, og leingi helt verjan tætt.

Men tá ið GÍ eitt korter fyri leiklok fekk enn eitt hornaspark, eydnaðist tað at skora. Málmaðurin hjá ÍF fekk fingrarnar á innleggið, men bólturin datt niður við aftaru stong, har Kaj Ennigarð stútaði hann í málið.

### Tvey tøtt mál

Tríggjar minuttir fyri leiklok skoraði innskifti Hanus Eliasen fyri heimaliðið. Ein høgur bóltur var longdur fram á vøllin, Hanus vann kapprenningina, og so smekkaði hann til við vinstra beini, og bólturin rakti stongina og endaði í málinum.

Nú hevði ÍF fingið trý stig í posan, men hóast tað bet vóru fáir minuttir til at binda kjaftbandið fyri, gekk tað ikki. Minuttin eftir javnaði GÍ. Eitt innkast varð tveitt inn í brotsteigin, tveir mans høvdu høvdið á bóltinum, áðrenn verjuspælarin Kaj Ennigarð aftur stóð á rætta stað, og hesaferð sparkaði hann bóltin í málið.

Grannaliðini skoraðu tvey mál í part, og hóast GÍ hevði meira spæl allatíðina, var tað ikki óuppiborið, at ÍF fekk stig burtur úr dystinum. Annað vikuskiftið á rað mistu teir á heimaliðnum tó ein sigur í síðstu løtu.